

# KARMAR *UM* LÍV

ARKITEKTURPOLITIKKUR
í Føroyum



# ARKITEKTURUR ER FYRI OKKUM ØLL

Arkitekturur er umhvørvi úti og inni. Arkitekturin skapar karmarnar um okkara lív og ávirkar okkum við sínum virðum og hugsjónum.

Arkitekturur er ikki ein sjálvstøðugur leikari. Arkitekturur er ein ítøkiliggerð av hugsjónum og raðfestingum, sum mynda samfelagið.

**ARKITEKTURPOLITIKKUR** ER EIN HUGBURÐUR – EIN VIÐURKENNING AV, AT ARKITEKTURUR EIGUR SÍN SAMFELAGSLIGA LUT, OG AT HANN ER VIÐKOMANDI OG NEYÐUGUR.



**Útgevari:** Landsverk, í samstarvi við Arkitektafelag Føroya, 2021
**Myndir:** Sendistovan, Ole Jensen, Nina A. Arge
**Rættlestur, uppseting og prent:** Sendistovan
**Permumynd:** Hanni Bjartalíð
**Samband:** Viðkomandi viðmerkingar til Arkitekturpolitikkin kunnu verða sendar til Landsverk á ***lv@lv.fo***, viðmerktar "Arkitekturpolitikkur"



INNIHALDSYVIRLIT


1 ARKITEKTONISK DYGD

2 PLANLEGGING

3 BURÐARDYGD

4 NÝMENNING





# HUG-SJÓN

FØROYAR SKULU VERA EITT STAÐ, HAR FÓLK YNSKJA AT LIVA OG VIRKA. HAR TEY TRÍVAST OG MENNAST.

EIN OG HVØR SKAPAN OG UMSKAPAN AV OKKARA UMHVØRVI SKAL VERA MERKT AV UMHUGSNI OG DYGD.

TILVITAN UM ARKITEKTONISKA DYGD MENNIR UMHVØRVIÐ OG STYRKIR OKKARA SAMLEIKA.





*ARKITEKTURPOLITIKKURIN ER IKKI STATISKUR; HANN ER EITT LIVANDI AMBOÐ OG VERÐUR EFTIRMETTUR VIÐ JØVNUM MILLUMBILUM.*

*ENDURSKOÐAÐ ÚTGÁVA VERÐUR TØK ANNAÐHVØRT ÁR.*





# 1

# ARKITEKTONISK DYGD

Arkitektonisk dygd sæst í vælvirkandi, vøkrum og haldgóðum verkum, sum veita stimbrandi og heilsugóðar karmar um virknað og lív.

Eyðkennið fyri arkitektoniska dygd er, tá skapta umhvørvið røkkur fólkinum sum eitt tilvitað úrslit av, hvussu givna tilfeingið og givnu treytirnar verða handfarin.



# 1

# ARKITEKTONISK DYGD

**ÁTAKSØKINI NIÐANFYRI ERU SETT Á SKRÁ FYRI AT MENNA FATANINA AV ARKITEKTURI OG ARKITEKTONISKARI DYGD.**

| *HVAT* **SKAL MENNAST?** | *HVUSSU* **SKAL TAÐ MENNAST?** |
|---|---|
| **ALMENN BYGGING**<br>Almenn bygging, planlegging og landslags-viðgerð skal vera ein dygdargóð fyrimynd. | Ráðini, Landsverk og aðrir almennir aktørar binda seg til at kravfesta arkitektoniska dygd innan almenna bygging, planlegging og landslagsviðgerð |
| **KOMMUNALUR ARKITEKTUR-POLITIKKUR**<br>Kommunur/bygdarráð skulu kenna hugtakið arkitekturpolitikk. | Avvarðandi aðalráð skal kunna kommunur og kommunufelagið um týdningin av arkitekturi og eggja til at seta arkitektur-politikk á dagsskrá. |
| **UNDIRVÍSING**<br>Børn og ung eru tey, sum í framtíðini fara at taka avgerðir og skapa okkara samfelag. Undirvísing um arkitektur lærir børn og ung at skilja týdningin av skapta umhvørvinum. | Landsverk, Mentamálaráðið og kommunur skulu skipa fyri, at arkitekturur verður evni í skúlum – bæði fólkaskúlum, miðnáms-skúlum og kvøldskúlum. |
| **GRANSKING**<br>Gransking lýsir tilgongdina aftan fyri tað skapta umhvørvið, sum vit liva í. Øll plan-legging eigur at taka støði í gransking. | Landsverk og kommunur eiga í størri mun at samstarva við lærdar stovnar, t.d. við at hava Phd-lesandi knýtt at stovnunum. Aðalráð og kommunur eiga at stuðla royndarverkætlanum. |



# ARKITEKTONISK DYGD

| *HVAT* SKAL MENNAST? | *HVUSSU* SKAL TAÐ MENNAST? |
|---|---|
| **VITANARDEILING**<br>Lætt skal vera hjá øllum at kunna seg um byggisøgu okkara og fortreytir fyri samfelagsmenning. | Landsverk og aðalráð skulu innsavna alt skrásett tilfar um føroyska bygging og gera tað atkomuligt fyri øll. |
| **MIÐLING OG KJAK**<br>Vit skulu kunna um arkitektur, planlegging og landslagsviðgerð. Bæði um einstakar verkætlanir og í víðari merking.<br><br>Vit skulu menna eina kjakmentan, ið er á fakligum høgum støði, men samstundis rakar breitt. | Vit skulu arbeiða fyri, at miðlarnir varpa meira ljós á týdningin av góðum arkitekturi.<br><br>Arkitektafelagið skal virka fyri, at limirnir luttaka í almenna kjakinum um arkitektur.<br><br>Arkitektafelagið, kommunur og Landsverk eiga at heiðra verkætlanir og átøk, ið rúma arkitektoniskari dygd. |
| **ARKITEKTURDAGAR**<br>Ein dag um árið eigur arkitektururin at vera miðdepil í almenna rúminum. | UIA (The International Union of Architects), skipar fyri kunnandi átøkum um arkitektur, millum annað árliga arkitekturardagin. Landsverk og stóru kommunurnar skulu vera aktivir luttakarar á Arkitekturdegnum í samráði við Arkitektafelagið. |
| **FRAMSÝNINGAR, KAPPINGAR OG FYRILESTRAR**<br>Vit skulu varpa ljós á hugtakið arkitekturur. | Landsverk skal skipa fyri fakligum fyrilestrum og framsýningum um arkitektur. Landsverk, kommunur og Arkitektafelagið skulu leggja størri dent á arkitektakappingar innan almenna bygging. |





# 2

# PLANLEGGING

Menning av samfelagnum er ein støðug tilgongd, ið eisini sæst aftur í bygningum og verkløgum, og sum á ymsan hátt ávirkar tilveru borgarans.

Holl vitan er ein fortreyt fyri væleydnaðari planlegging og bygging. Borgarin er brúkari av okkara bygningum og umhvørvi, og er borgaranna vitan tí virðismikið tilfeingi at gagnnýta í sambandi við planlegging og skapan av umhvørvi okkara.



# 2

# PLANLEGGING

ÁTAKSØKINI NIÐANFYRI ERU SETT Á SKRÁ FYRI AT MENNA EIN HUGBURÐ OG EINA NÝGGJA TILGONGD INNAN SAMFELAGSPLANLEGGING

| *HVAT* **SKAL MENNAST?** | *HVUSSU* **SKAL TAÐ MENNAST?** |
|---|---|
| **LANDSPLANLEGGING**<br>Yvirskipað planlegging er eitt amboð til at raðfesta og gagnnýta náttúrugivna, búskaparliga og menniskjaliga tilfeingið á besta og mest skynsama hátt. | Landið eigur at fara undir eina landsplanlegging, ið inniber yvirskipaðar ætlanir fyri staðseting og lendisnýtslu til búseting, vinnu, stovnar, fríøki, landbúnað, vegir og havnir, frítíðarøki v.m. Hetta við støði í topografi, veðri, landslagi og havinum kring okkum- og í skynsamari nýtslu av tilfeinginum.<br><br>Landsverk og Umhvørvisstovan skulu (saman við almennum stovnum, kommunum og kommunalum stovnum, sum varða av bygging, infrakervi, orkuveiting, náttúru- og umhvørvismálum) fara undir allýsing og greining av atlitum, ið eru viðkomandi fyri lendisnýtslu og nýtslu av havøkinum kring oyggjarnar.<br><br>Síðani eiga vit at gera eitt regluverk, sum tryggjar, at henda landsplanlegging verður samskipað við býarplanlegging og lokalplanlegging eftir einum felags leisti. |



# PLANLEGGING

| *HVAT* SKAL MENNAST? | *HVUSSU* SKAL TAÐ MENNAST? |
|---|---|
| **BORGARALUTTØKA**<br>Borgarin skal vera partur av planleggingar- og verkætlanartilgongdini. Hetta fyri at tryggja, at viðkomandi atlit at borgararunum kunnu viðgerast og raðfestast í mun til atlit at øðrum pørtum. | Landsverk, Umhvørvisstovan og kommunur orða eina mannagongd millum áhugapartar innan bygging, planlegging og lendisviðgerð og millum borgarar fyri at tryggja, at borgarin altíð er við í planleggingini og verkætlanini. |
| **BYGNINGSARVUR**<br>Bygningar, verk og arkitektonisk umhvørvi eru týdningarmiklir mentanar- og søguberarar. Umráðandi er at tryggja hesi virði fyri framtíðina. | Landsverk og kommunur skulu fara undir at skráseta varðveitingarverd verk og umhvørvi (SAVE-metingar: Survey of Architectural Value for the Environment). Vit mugu tryggja, at varðveitingaratlit verða samskipað við planleggingina av býarmenning og infrakervi. |
| **MYNDUGLEIKAMÁLSVIÐGERÐ**<br>Myndugleikaviðgerð av byggi- og planleggingarmálum skal altíð taka støði í arkitekturpolitikkinum. | Arkitekturpolitikkurin skal rótfestast í ráð og kommunur og gerast ein sjálvsagdur partur av málsviðgerðini. |



# 3

# BURÐARDYGD

Givna tilfeingi okkara er avmarkað, og arkitektafaklig íkast innan bygging, planlegging og lendisviðgerð skulu tí vísa á loysnir við byggilistarligum og funktionellum dygdum, sum samstundis taka støði í skynsamari og haldgóðari nýtslu av tilfeingi.

Hesi atlit eru galdandi bæði fyri byggingina sjálva og í mun til rakstur og viðlíkahald.

Arkitekturpolitikkurin skal tilvitað uppraðfesta skynsama nýtslu av tilfeingi og orkugóðum loysnum, og verkætlanir skulu verða mettar við støði í byggilistarligum, heildarbúskaparligum og burðardyggum atlitum, herundir umhvørvisligum árinum.



# 3

# BURÐARDYGD

ÁTAKSØKI SKULU HAVA TIL ENDAMÁLS, AT ATLIT AT BURÐARDYGD VERÐA EIN SJÁLVSAGDUR PARTUR AV ARKITEKTURINUM.

| *HVAT* **SKAL MENNAST?** | *HVUSSU* **SKAL TAÐ MENNAST?** |
|---|---|
| **BURÐARDYGG PLANLEGGING**<br>Vit skulu altíð taka støðu til umhvørvis- og heilsuárin, tá ið vit gera eina verkætlan. Vit skulu taka atlit til lívfrøðiliga margfeldið og dýrabara landslagið. | Landsverk, kommunur og ráð skulu leggja dent á størst møguligu virðisøking og skynsamasta nýtslu av tilfeingi okkara í einhvørjari verkætlan.<br>Serfrøði skal takast við upp á ráð, áðrenn ein verkætlan verður sett í gongd. |
| **HEILDARBÚSKAPUR**<br>Ráðini og kommunurnar skulu saman við Landsverki binda seg til at taka heildarbúskaparlig atlit sum týðandi og stýrandi tátt í almennari bygging framyvir. | Ein umhvørvislig heildarmeting skal vera sjálvsagdur partur av einhvørjari verkætlan. |
| **ALMENN BYGGING**<br>Burðardygg atlit skulu gerast sjálvsagdur partur av almennum verkætlanum. | Landsverk og ráðini skulu seta upp leiðreglur fyri burðardygga bygging. Almennar verkætlanir skulu vera fyrimyndir innan burðardygga bygging og planlegging. |



# BURÐARDYGD

| *HVAT* **SKAL MENNAST?** | *HVUSSU* **SKAL TAÐ MENNAST?** |
|---|---|
| **ORKUMENNING**<br>Landsverk og kommunalir byggiharrar skulu kunna seg um og savna inn vitan um byggitøkni, burðardygga bygging og onnur viðurskifti, ið hava týdning fyri orkutørv, tilfeingisnýtslu og umhvørvi. | Landsverk og kommunalir byggimyndugleikar skulu gera leiðreglur fyri orkuflokking av bygningum og ein leist fyri íverksetan. Tilfarið skal vera lætt atkomuligt á talgildum miðlum, so tað er tøkt hjá øllum at brúka. |
| **BYGNINGSSKRÁSETING**<br>Vitan og tilvitan um verandi bygging skal mennast. | Umhvørvisstovan, Landsverk og kommunur skulu skráseta dátur fyri allar bygningar í eina yvirskipaða skrá – í mun til burðardygd, siðsøgulig virði og arkitektonisk virði og virkisføri. |





# 4

# NÝMENNING

Samfelagið er í støðugari broyting, sum ber í sær nýggjar møguleikar og avbjóðingar. Bygging skal geva rúm fyri møguleikum fyri at lúka krøvum, sum samfelagsmenningin og broyttar fyritreytir bera í sær.

Planlegging er ein drúgv tilgongd, og neyðugt er tí at hugsa langt fram í tíðina, um verkætlanirnar enn skulu vera tíðarhóskandi við avhending.



# 4

## NÝMENNING

NIÐANFYRISTANDANDI ÁTAKSØKI ERU SETT Á SKRÁ VIÐ TÍ Í HUGA, AT NÝMENNING OG FRAMSKYGNI GERAST PARTUR AV FRAMTÍÐAR ARKITEKTURI.

| *HVAT* **SKAL MENNAST?** | *HVUSSU* **SKAL TAÐ MENNAST?** |
|---|---|
| **NÝHUGSAN**<br>Neyðugt er, at vit áhaldandi menna okkara hugsan um bygging, planlegging og lendisviðgerð. | Landsverk, kommunur, Bústaðir, Byggiharrasamtakið og Arkitektafelagið skulu stimbra og fremja royndarverkætlanir, sum eru nýmennandi innan bústaðarmynstur, lendisnýtslu, tilfarsnýtslu, byggitøkni, orkunýtslu, orkuveiting v.m. |
| **ALTJÓÐA SAMSTARV**<br>Í Føroyum hava vit avmarkaðar royndir og førleikar. Í skynsaman mun eiga vit at nema okkum vitan úr londum rundan um okkum. | Vit skulu í størri mun raðfesta at luttaka í altjóða netverkum og samstørvum. Eftirfylgjandi er neyðugt at deila vitanina, so hon er øllum samfelagnum at gagni. |
| **FRAMTÍÐARGRANSKING**<br>Tess meira, vit vita um framtíðar samfelagið, tess lættari er at fyrireika karmarnar um tað á skynsamasta hátt. | Landsverk og aðalráð skulu raðfesta tvørfakligt arbeiði innan framtíðargransking. |
| **KAPPINGAR OG NÝMENNA ARKITEKTURIN Í SAMFELAGNUM**<br>Kappingarmenna og nýmenna arkitekturin í samfelagnum. | Landsverk, kommunur og Arkitektafelagið átaka sær at skipa fyri, at størri dentur verður lagdur á arkitektakappingar innan almenna bygging. |

*ARKITEKTURUR ER EITT ALMENT EVNI,*
*IÐ VIÐKEMUR OKKUM ØLLUM.*

*GÓÐUR ARKITEKTURUR SAVNAR MENNISKJU*
*OG STYRKIR FELAGSSKAPIN.*

*GÓÐUR ARKITEKTURUR SKAL VERA EIN GÁVUMILD*
*VINARGERÐ TIL STAÐIÐ, UMHVØRVIÐ OG SAMFELAGIÐ.*

LENE TRANBJERG

